# Hetta er lívið

**Hóast hóttanir um grísaveitslur eru Bárður og Durita saman við Lizu Marklund og Camillu Läckberg í viðførinum farin til Mallorka í summarfrí. Tey hava ein stálsettan vilja um at slappa av og Bárður gleðir seg sum eitt barn**

## Ferðafrásøgn



Durita Lamhauge Jóansdóttir

**- 1. partur**

Í summar vóru eg og drongur mín, Bárður, eina frálíka ferð á sólskinsoynni Mallorka. Hetta var okkara jomfrúferð suðureftir til sól, strond og sjógv. Tað vóru tí tveir sera spentir og hvítir føroyingar, sum sótu í Sterling flogfarinum úr Billund ávegis til Mallorka leygarnáttina tann 5. juli. Bárður hevði sett seg væl til rættis við pútu, teppi og Lizu Marklund. Hann var í avbera góðum lag.

### Feriuoyggin yvir øllum

Mallorka verður kallað tann gylta, grøna og friðsæla oyggin. Hon er størsta oyggin í Spania og hoyrir saman við Ibiza og Menorka til sjálvstýrandi baleariska oyggjabólkin. Oyggin hevur eitt sera fjølbroytt og vakurt landslag við nógvari sól. Ti er hon eisini um at bresta av turistum. Mallorka er komin at merkja hópturisma og leiguferðir, sum av álvara byrjaðu í 1950árunum. Tað koma heili 10-11 milliónir ferðandi um árið. Fólkatalið á oynni liggur um 790 túsund. Um ein megnar at berja seg ígjøgnum hópin av øðrum ferðandi, er oyggin á tremur við søgu, arkitekturi og mentan. Har eru loyndarfull slott, ævintýrakendir havar, bergtakandi holur og stór og veldig fjøll, sum minna ikki sørt um fjøllini í Norðuroyggum, tó fjøllini í Mallorka eru nakað væl turrari. Á eystur- og vestursíðuni eru nakrar av vakrastu og reinastu strondunum í Miðjarahavinum. Havið er klárt asurblátt og sandurin fínur sum sukur og næstan snjóhvítur.

Á veg út úr Son Sant Joan flogvøllinum beint uttan fyri høvuðsstaðin Palma í Mallorka sást beinanvegin ein stór og sjálvkoyrandi turistmaskina. Har stóðu ferðaleiðarar frá ymisku ferðaskrivstovunum og leiddu okkum til eini 20 bussar, sum allir skuldu koyra tey ferðandi til ymisk ferðastøð. Fólk tysjaðu til bussarnar sum meyrur og vórðu dirigerað í bussarnar sum bilar, ið vera stýrdir av einum ferðslupolitisti. Eg og Bárður skuldu búgva í Santa Ponca á suðurvestursíðuni. Tilsamans skuldi bussurin koyra okkum ferðafólk til 7 ymisk hotell í ymiskum býum, ikki langt frá hvørjum øðrum. Bárður var heilt ovfarin av hesum effektiviteti og helt við sær sjálvum, at hetta hevði hann ikki upplivað fyrr.

### Frá grísaveitslum til professionalismu

At ferðast til Mallorka hevur eisini við sær fordómar. Eg hevði hoyrt hugtakið grísafest nakrar ferðir, tá ið eg nevndi, at eg fór til Mallorka. Ikki visti eg, hvat hetta var, men fann líðandi út av, at í 1980árunum streymaðu danir til oynna. Í Mallorka varð skipað fyri stórum grísaveitslum, sum varaðu í nakrar tímar. Turistarnir fingu fleskasteik og ov mikið av víni ella sangria afturvið. Úrslitið var, at flestu turistar drukku seg frá vón og viti, so ringt var at skilja



*Ótrúligt at síggja hesa sjón hvørt kvøld frá altanini*



*Bárður nýtir útsýnið*

í millum, hvør var fólk og hvør var grísur. Hetta hótti umdømið hjá Mallorka so mikið nógv, at grísaveitslur í dag eru bannaðar.

Í dag er oyggin ein sera professionel og trygg feriuoyggj. Av tí at oyggin leingi hevur verið vælumtókt og er um at tippast av turistum, skal ein ikki vænta at uppliva eina autentiska og óspilta mentan á oynni. Til tað eru tað alt ov nógvir turistar. Tú fært Bratwurst og Grünkohl, english breakfast, meat pie, danskar frikadellir, knekkbreyð, indian curry, kinverska buffét, pizza, pasta, burgarar og mangt annað. Í Santa Ponca var gastronomiin lagað til turistarnar og av tí sama var hon ikki serliga áhugaverd. Á oynni eru tó eisini sera góðar matstovur, har onkur hevur fingið eina Michelinstjørnu. Eftirsum Mallorka hevur verið ein vælumtókt feriuoyggj í langa tið, er tað ótrúliga ómakaleyst at vera turistur. Tú kanst altíð samskifta á sponskum, týskum ella enskum. Enskir, danskir og týskir læknar eru lættir at finna og løgreglumenn ansa dagliga eftir øllum turistunum. Bárður, sum sjálvur hevur búð í Granada í Spania, var heilt bergtikin av, hvussu væl alt virkaði her. Hetta var so avgjørt ikki tað Spania, sum hann hevði upplivað.

### Avslappandi Santa Ponca

Santa Ponca sá út til at vera ein feriubýur burturav. Býurin bendir seg sum ein úttambaður hestaskógvur um eina vakra og stóra hvíta sandstrond, har hotellir liggja allan vegin rundan um strondina og eisini longri uppi í fjøllunum. Ein vegur rammar inn strondina og við henda vegin liggja mathandlar, matstovur, klæðnahandlar, apotek, bankar, barrir og sjálvandi eisini McDonald`s og Burger King. Fólk spákaðu aftur og fram og hugdu at armbondum og turrikløðum, onnur sótu og prátaðu, meðan tey drukku sangria ella ótu okkurt meira mettandi. Har vóru forelskað pør, nýklaktar barnafamiliur, flokkar av sólbrendum pensionistum, sum sóu út til at koma her ár eftir ár og ein hópur av yngri meira óstruktureraðum tannáringum, sum óivað vóru farnir ein ballingartúr suðureftir. Flestu turistarnir komu ikki óvæntað frá Norðurevropu og Norðurlondum.

Onkursvegna er tað fantastiskt at vera á einum stað saman við einum hópi av øðrum turistum. Ein heilt serligur dámur veksur fram, tá øll hesi fremmandu eru blandað saman. Tað hvíldi ein